## Aftur reint vatn í Havn

Havnarborgarar kunnu nú eykkleysir drekka vatn úr krananum, tí fríggjadagin varð vatnreinsiverkið í Havnardali sett til aftur, so nú fær øll Havnin sóttreinsað vatn, og klor verður ikki longur latið í vatnið.

Tískil er ikki neyðugt longur at kóka vatnið, áðrenn drukkið verður, upplýsir deildarleiðarin á Vatnverkinum í Havn, Viggo Christiansen

## Dreingirnir syngja hósdagin

Eirikur Lindenskov

Hósdagin verður aftur farið undir venjingarnar hjá dreingjakórinum í Kommunuskúlanum.

Tað eru teir báðir, Bjarni Restorff og Palli Hansen, ið saman við øðrum sangkreftum venja kórið, ið telur einar 25-30 dreingir í aldrinum frá triðja flokki og uppeftir.

Kórið venur í Kommunuskúlaskálanum - og verður byrjað í morgin klokkan 13:30.

Hanus Joensen, skúlastjóri, sigur við Sosialin, at aðrir dreingir eisini eru hjartaliga vælkomnir at venja við kórinum, sum ikki bert er ætlað dreingjum úr Kommunuskúlanum, hóast kóri venur har.

Dreingjakór eru ikki vanlig í Føroyum, og tí halda teir, ið stíla fyri hesum kórinum, hetta vera eina sera spennandi uppgávu, tí tað vísir seg ofta at verða trupult at fáa dreingir í hasum aldrinum at syngja. Men hesir sýnast sera hugagóðir, sigur Hanus Joensen.

## Kvøldskúlin lýsir fríggjadagin

Fleiri hava kanska væntað, at lýsingin frá kvøldskúlanum í Havn longu skuldi havt verið í bløðunum. Í hesum sambandi boðar Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli boðar frá, at stóra lýsingin kemur í bløðini fríggjadagin.

## Tvey nýggj stór skip

*Stórar broytingar í siglingarkervinum og skipaflotanum hjá Eimskip*

Í oktober í ár broytir Eimskip núverandi siglingarkervið. Hetta kemur eisini at hava við sær stórar broytingar í skipaflotanum, tí eldri skip verða skift út við nýggj og tøkniliga meira framkomin skip.

Skipini, Eimskip í dag hevur til Føroya-siglingina, eru fýra í tali men minka nú niður í tvey. Nýggju skipini eru tó umleið helvtina størri enn til dømis Brúarfoss og sigla eisini skjótari. Tey verða partur av eini nýggjari siglingarleið hjá felagnum og fara at sigla til Føroya, Hálands, Týsklands, Svøríkis, Noregi, Danmarkar, Føroyar og Íslands. Hetta eru størstu bingjuskip higartil, ið koma at hava regluligt samband við Havnina. Leggjast kann afturat, at transit-tíðirnar í flest øllum havnum verða styttri.

Nýggju skipini fara ikki at leggja at í Klaksvík sum vanligt. Eimskip fer tó framvegis at bjóða viðskiftafólki úr Norðoyggjum somu flutningssømdir sum fyrr.

Við hesi tillaging av siglingarkervinum leggur Eimskip dent á at varðveita eina góða flutningstænastu og at tryggja eina framhaldandi menning av føroyska marknaðinum, sigur Eimskip í Føroyum í tíðindaskrivi.




# InternetSosialurin í nýggjum líki

*Á trý ára degnum hjá InternetSosialinum varð triðja útgávan tikin í nýtslu. Í dátugrunninum hjá InternetSosialinum liggja 24.000 greinar í 914 útgávum*

Eirikur Lindenskov

Mánadagin vóru liðin trý ár síðani, at Sosialurin fór undir at leggja blaðið - alt sum tað er - út á internetið, so til bar hjá fólki kring heimin allan at lesa tey tíðindi, ið prentað vóru í blaðnum, áðrenn blaðið var á gøtuni í Havn.

Fólk hava tikið væl ímóti hesi skipan, sum í dag er ein náttúrligur partur av arbeiðinum hjá blaðfólkunum.

Men slíkar heimasíður krevja støðugar broytingar og menning. ,Tað er við tí fyri eyga, at vit á trý ára degnum valdu at taka nýggju skipanina í nýtslu.

Tað var í 1996, at Sosialurin fór undir fyrstu royndirnar við internetblaðnum. Tá var tað í samstarvi við Faroenews við Óla Olsen, sum í dag er stjóri í KT-fyritøkuni VIT. Tá var blaðið dagført á leið eina ferð um vikuna, men hetta vóru lesarar kring heimin sjálvandi sera ónøgdir við. Men internetið var nýtt í Føroyum tá, og tí var hetta arbeiðið rættuliga at bróta upp úr nýggjum, tí fáir føroyingar høvdu tá atgongd til internetið - og tíansheldur kendu til tað.

Á vári í 1997 varð farið undir fyrstu royndirnar at leggja Sosialin út á netið dagliga. Hesar royndir eydnaðust so væl, at Sosialurin í samstarvi við Faroenet tann 4. september fór undir regluliga at dagføra blaðið - í fyrstu syftu sum sum eina royndarskipan.

Í november í 1997 varð InternetSosialurin alment tikin í nýtslu, tá Sámal Petur í Grund, táverandi landsstýrismaður í samskiftismálum, trýsti á knøttin, sum dagførdi blaðið.

Síðani 1997 eru útvið 24.000 greinar lagdar út á netið í 914 útgávum. Allar hesar greinar eru tøkar í dátugrunninum, og ber til hjá fólki at leita upp á orð í øllum hesum greinum. Tó skal viðmerkjast, at allar tænasturnar ikki verða virknar fyrstu dagarnar, meðan umleggingin fer fram, men tá vikan er farin at halla, skuldi alt verið í lagi aftur.

Sum fjølmiðil hevur internetið broytt munandi um arbeiðið hjá blaðfólki. Eitt er, at teldupostur og digitalar myndir hava gjørt, at til ber at skriva og lýsa hendingar við myndum nærum beinanvegin, tær eru farnar fram. Annað er, at nú ber til hjá bløðunum at kappast við loftmiðlarnar um tíðindi eftir prentbyrjan. Á henda hátt kunnu vit sum blað altíð verða fyrst við tí síðsta.

Annað endamál við InternetSosialinum er at gera tað lættari hjá lesarum at lesa og finna fram greinar. Størri dentur verður í framtíðini lagdur á at dagføra síðuna við tíðindum gjøgnum dagin. - og í sambandi við at Sosialurin tann 3. oktober kemur út í heilt nýggjum sniði, er nýggja búmerkið hjá blaðnum brúkt í internetútgávuni.

**Lesið eisini Sosialin á Internetinum**

**www.sosialurin.fo**



stephanssons hús 31 42 91




Eimskip heintar vøruna kring alt Evropa og í Føroyum standa 30 starvsfólk til reiðar at taka í móti, og flyta tær vøruna heilt fram til dyrnar. Ring og fá nærri at vita á 31 97 97.